## Toll- og Skattstova Føroya

# Sjálvuppgávan 2006

Løntakarar, ið hava fingið sjálvuppgávu og ognaruppgerð fyri 2006, skulu lata hesar inn til Toll- og Skattstovuna í seinasta lagi 15. mars 2007.

Um talan er um uttanlandsinntøku skal serstakt fylgiskjal eisini sendast inn saman við sjálvuppgávuni. Tey, ið hava brúk fyri hesum skjalinum og ikki hava fingið tað, fáa tað við at venda sær til Toll- og Skattstovuna, tlf. 352600 ella á heimasíðuni: www.tollskatt.fo

Skattgjaldarar, ið hava fingið skattauppgerð, skulu kanna um allir upplýsingar eru við og at teir eru rættir. Eru upplýsingar skeivir ella mangla, skulu hesi senda sjálvuppgávu við rættaðu upplýsingunum innan 15. mars 2007.

Eisini skulu tey, ið hava fingið skattauppgerð, har allir upplýsingar ikki eru við, senda inn sjálvuppgávu við rættaðu upplýsingunum.

Sjálvuppgávu at fylla út finnur tú í bóklinginum »Skatturin 2006«, sum varð sendur út í hvørt hús í januar mánað, ella við at venda sær til Toll- og Skattstovuna.

Allir skattgjaldarar hava fingið sendandi kapitalvinningssjálvuppgávu eisini. Á hesari eru prentaðir upplýsingar um rentuinntøku og rentuskatt frá føroyskum peningastovnum og í ávísum førum eisini vinningsbýti og vinningsbýtisskattur frá føroyskum partafeløgum.

Eru upplýsingarnir á kapitalvinningssjálvuppgávuni rættir og fullfíggjaðir, er ikki neyðugt at senda hesa inn aftur.

Men mangla upplýsingar, skal kapitalvinningssjálvuppgávan fyllast út við fullfíggjaðum upplýsingum og sendast til Toll- og Skattstovuna innan 15. mars 2007 við møguligum skjalprógvum.

Sjálvuppgávan og kapitalvinningssjálvuppgávan kann, um talan ikki er um B-inntøku, eisini sendast inn umvegis internetið www.tollskatt.fo

Roknskaparskyldug hava freist til 1. mai 2007 at senda sjálvuppgávuna og roknskapin inn.

Um fullfíggja sjálvuppgáva og ognaruppgerð ikki verður send inn rættstundis verður áløgd sekt upp til 5.000 kr.

**TOLL- OG SKATTSTOVA FØROYA**

## Fast starv á

# Føroya Barnaheimi

Søkt verður eftir einum starvsfólki til Familjudeildina á Føroya Barnaheimi. Starvið ið er eitt fulltíðarstarv er leyst til setan frá 01.05.2007 ella skjótast til ber. Tann ið settur verður í starvið, skal starvast í skiftandi vaktum á Familjudeildini.

**Um Familjudeildina:**

Á Familjudeildini eru 7 fólk í starvi, øll við viðkomandi útbúgving.

Endamálið við arbeiðinum á Familjudeildini er, at foreldrini verða styrkt og stuðla í at vera foreldur, soleiðis at familjan kann virka betur sum ein heild. Eisini er endamálið at fáa greiðu á, hvørjar styrkir og hvørjar trupuleikar familjan hevur, og í hesum sambandi meta um, hvat slag av stuðli er best og mest viðkomandi at veita familjuni framyvir.

**Førleikakrøv:**

Vit sóknast eftir einum starvsfólki, ið hevur ávísan kunnleika til familjuarbeiði. Tað er umráðandi, at viðkomandi hevur fakligan áhuga og góð samstarvsevni. Tann ið settur verður, skal kunna arbeiða sjálvsstøðugt.

Ein partur av arbeiðinum er skrivligt arbeiði, og umráðandi er, at viðkomandi dugir væl at málbera seg bæði í skrift og talu.

**Útbúgving:**

Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur útbúgving sum pedagogur, sosialráðgevi, sjúkrasystir, fysioterapeutur ella ergoterapeutur. Ynskiligt hevði verið, um viðkomandi somuleiðis hevur eina terapeutiska eftirútbúgving.

**Løn:**

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Um umsøkjari við aðrari útbúgving enn teim omanfyri nevndu fær starvið, verður viðkomandi løntur eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag fyri hjálparfólk.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 21.03.2007

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Brynhild M. Joensen deildarleiðara ella Beintu Johannesen Mørkøre, leiðara á tlf. 312320

**Føroya Barnaheim**
Pedda vid Steingøta 10
100 Tórshavn



## Runavíkar Kommuna
søkir eftir

# Pedagogum til Barnagarðin á Mýrunum

Á Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur við 14 børnum í hvørjari, 2 barnagarðsstovur við 20 børnum í hvørjari, 1 barnagarðsstova við 20 6-ára gomlum børnum og 1 stova við børnum við serligum tørvi.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- hevur umsorgan fyri børnunum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

**Søkt verður eftir:**

- 1 Varaleiðara 35-40 t har av 8 t leiðsla um vikuna,
- 1 pedagogi 30 t um vikuna, til barnagarðsstovu við 6-ára gomlum børnum og
- 1 pedagogi 30-35 t um vikuna, til vøggustovu

Varaleiðarastarvið og pedagogstarvið í vøggustovuni verða sett 1. apríl 2007 ella eftir nærri avtalu. Pedagogstarvið í barnagarðsstovuni verður sett 15. mai 2007 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss leiðara ella Mariu í Króki varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin 21. mars 2007, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26
Postrúm 139
FO-600 Saltangará



# Bilur til sølu

BMW 525 tds aut. til sølu. Hevur sóltak og er sera væl hildin. Til sølu fyri kr. 160.000,-.

**Tlf. 213267**

# Frá Sandoyar Javnaðarfelag

Aðalfundur verður í Samljóð Skopun Leygarkvøldið 10. mars kl. 18.00

Kl.19.00 verður fundur undir heitinum »Flokkurin møtir veljarunum«. Við á fundunum verða ting- og landsstýrisumboð floksins.

Nýggir limir kunna tekna seg.

*Sandoyar Javnaðarfelag*



## Skoda Octavia Combi TDI SLX

Nýsýnaður Skoda Octavia frá sept. 2000 til sølu vegna flyting. Hevur koyrt 99.000 km.

Silvurgráur ikki-roykjara bilur, ið hevur verið til øll eftirlit. Bilurin hevur bert havt ein eigara. Tannreimin er í lagi.

**Útgerð:** 15" alu-felgur, aircon., sentrallás, startsperru, hita í setrum, el-rútar, el-spegl v/hita, armlen, bagagugardin, split baksetur, ABS, ESP, lakkeraðir kúfangarar, spoylara aftan, tónaðir rútar.

**Tlf. +45 96 83 40 80 ella +45 30 29 15 67**